# Mentanarnáttin 2005



*Amtmansgarðurin verður eitt av nýggju tilboðunum á listastevnuni. Garðurin er tiltikin vakur, men er ikki opin fyri almenninginum. Tað verður hann tó fríggjakvøldið. Listastevnan 2005 fer annars at hava sera nógv ymiskt at bjóða*

*Mynd: Bárður*

**Síðani 2001 hevur mentanarnáttin í Havn verið hildin fyrsta fríggjadag í juni, og í ár verður einki undantak í so máta. Komandi fríggjakvøld verða hópin av tiltøkum og tilboðum í Havnini**

MENTANARNÁTTIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Tá vit týsmorgunin fingu orðið á Ingigerð á Trøðni á Kunningarstovuni í Havn, hevði hon úr at gera, við at leggja seinastu hond á skránna til mentanarnáttina. Hon gav sær tó stundir at greiða okkum frá um tiltakið.

### Alsamt vaksandi

Ingigerð sigur, at fyrsta mentanarnáttin varð hildin í 2001, og hon gekk fyrimyndarliga væl. Síðani tá er tiltakið bert voksið ár um ár, men í fjør vaks tað heilt nógv.

– Tað vóru nógvir handlar, sum ikki vóru við fyrstu árini, men sum síðani hava tikið avgerð um at vera við. Tað koma so nógv fólk í býin bæði úr Havn og av bygd, og tað er synd, um tey ætla sær inn í ein ávísan handil og so koma til stongdar dyr, greiðir Ingigerð frá.

Men eisini mentanarligu ískoytini gerast fleiri í tali.

Hon sigur, at umframt føroyingar hava ferðafólkini tí eisini stóra gleði av mentanarnáttini.

– Tey flestu koma higar at uppliva náttúruna og mentanina. Tey plaga at nýta dagarnar úti í náttúruni, men um kvøldið er ikki so nógv at fara til. Á mentanarnáttini kunnu tey síggja sera nógv ymiskt, sum tey annars ikki høvdu havt høvi til, sigur Ingigerð.

### Eitt sindur av hvørjum

Spurd, um tað ikki er vandi fyri, at tiltøkini gerast ov nógv í tali, svarar Ingigerð, at tey hava tosað um tann trupulleikan.

– Vit hava havt spurningin á lofti, um alt skal verða loyvt, soleiðis, at miðbýurin verður ein stórur hurlivasi nakað sum á ólavsøku. Men enn hava vit ikki sagt nei við nakran, sum hevur ynskt at vera við, vísir hon á.

Eisini í ár eru nøkur nýggj tiltøk løgst afturat.

– Amtmannsgarðurin verður opin fyri almenninginum, Westward Ho, sum júst er afturkomin, verður við, og so er nýggja miðlahúsið eisini komið í býin síðani seinastu mentanarnátt, og har verður okkurt á skránni, greiðir Ingigerð frá.

Hon sigur, at tey sjálvandi royna at leggja seg eftir at hava fleiri ymisk tilboð, sum svara til allar aldursbólkar, men av tí, at tiltakið liggur um kvøldið og um náttina, eru tiltøkini til børn nakað avmarkað.

– Fólk av brandstøðini koma oman í býin við bilunum, og tað plagar at dáma børnunum væl. Og so hevur musikkskúlin eisini staðið fyri nøkrum áhugaverdum tiltøkum fyri bæði stór og smá. Men tað mesta er nokk fyri tey vaksnu, sigur Ingigerð.

Mentanarnáttin verður sett fríggjakvøldið 3. juni kl. 18.00 í gamla kommunuskúlagarðinum.

Tiltøkini, sum kunningarstovan hevur við at gera, enda við eini konsert kl 23.00 somuleiðis í gamla kommunuskúlagarðinum.

– Men, sum Ingigerð á Trøðni sigur, – Fleiri av hinum tiltøkunum plaga at halda fram inntil langt eftir tað.

## Miðlahúsið á mentanarnáttini

Fyri fyrstu ferð veðrur miðlahúsið í Vágsbotni eisini við á mentanarnáttini.

Kl. 21 fara Spælimenn við Kristian Blak á odda at spæla.

Eftir tað, fer Hildur Eyðunsdóttir, forkvinna í mentanarnevndini í býráðnum, at hugleiða.

Arbeitt verður eisini við at fáa onkran upplestur í lag, men enn er hetta ikki heilt komið undir land.

**eys**

## Mentanarnáttin 3. Juni 2005 – fyribilsskrá

**Tá blaðið fór til prentingar var endaliga skráin framvegis ikki liðug, men hetta er so fyribilsskráin, sum skuldi givið eina góða ábending um hvat fer at henda nær og hvar.**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 18.00 | Gl. Kommunuskúlagarði | Havnar Hornorkestur spælir og setur mentanarnáttina. Umboð fyri tiltakinum International Culture spæla |
| Kl. | Amtmansgarðurin | Kvintettin hjá Havnar Ungdómshornorkestur spælir |
| Kl. 17-23 | Bojsensgarður | Urtagarðurin er opin, Glymur syngur kl. 20 |
| Kl. ? | Býarbókasavnið | Yrkingar og tónleikur |
| Kl. 17 og 19 | Dr. Jakobsens gøta | Sælimenninir spæla |
| Kl. 10-20 | Føroya Fornminnissavn og Hoyvíksgarður | Lær at gera tog og bond |
| Kl. 16-22 | Galerie Focus | Framsýning |
| | Grasagarður | Tilhaldið hevur søluframsýning og café |
| Kl. 15-20.30 | Grasagarður | Tórshavnar Musikkskúli hevur konsertir í Grasagarði við tónleiki frá barnasangum til svingandi jazz og til ráan rock. Konsertin endar við sangum frá Grease |
| Kl. 15.00 | Grasagarður | Blástrið |
| Kl. 15.30 | Grasagarður | Barnakórið Dropar |
| Kl. 16.00 | Grasagarður | Látipípan |
| Kl. 16.30 | Grasagarður | Ung Stjørnuskot |
| Kl. 17.00 | Grasagarður | Skansa Big Band |
| Kl. 18.30 | Grasagarður | Tórshavnar Ungdómshornorkestur |
| Kl. 17.00 | Grasagarður | Skansa Big Band |
| Kl. 19.00 | Grasagarður | Stórbandittarnir |
| Kl. 19.30 | Grasagarður | Paradox |
| Kl. 20.00 | Grasagarður | Sangir úr sangleikinum Grease |
| | Handilskjarnin | Glott og Gleimur undirhalda í Barnadeildini |
| Kl. 17-20 | Kommunuskúlin | Høvið verður at síggja nýggja skúlabygningin |
| Kl. 11-22 | Listaskálin | Summarframsýningin letur upp kl. 21. |
| Kl. 17-23 | Miðbýurin | Kórið Glymur hevur pylsuvogn og syngur |
| Kl. 17-23 | Miðbýurin | Skótalið Sigmund brestisons hevur telt og undirhald |
| Kl. 21 | Miðlahúsið | Hildur Eyðunsdóttir, forkvinna í Mentamálanevndini og Spælimenninir spæla |
| Kl. 10-21 | Náttúrgripasavnið | Jubilæumsframsýning |
| Kl. 22 | Norðurlandahúsið | Summarframsýningin 2005 letur upp kl. 22.00<br><br>Til Mentanarnáttina spæla Karsten Vogel og Birds of Beauty.<br>Listafólkini eru hesi: Edward Fuglø, Astri Luihn, Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, Torbjørn Olsen, Eyðun av Reyni og Ingálvur av Reyni |
| Kl. 19-23 | Odd Fellow Losjan | Odd Fellow Loge F1, Ambólturin hevur opið hús í losjuni, Grønslandsvegur 56, |
| Kl. 23.00 | Rex | Konsert við Lama Sea |
| Kl.16-22 | Sjónlekarhúsið | Virkni og Vónin hava framsýning og søla í Sjónleikarhúsinum. Café og tónleikur |
| Kl. 18-23 | Smiðjan í Lítluvík | Tórshavnar Sløkkilið verður við á mentanarnáttini har høðustemaðið er »nýtt og gamalt«.<br><br>À Skálatrøð verða nýggir og gamlir brandbilar.<br><br>Møguleiki verður at sleppa upp við 30m høga stigabilinum at síggja ta deiligu Havn úr erva. Eisini verður møguligt at sleppa at royna eldsløkking við brandteppi og eldsløkkjara.<br><br>Í smiðjuni verður framsýning av myndum, gamlari og nýggjari útgerð, videoclip av ymsum eldum og venjingum og eisini verða spurnaðarlepar, ið verða við í lutakasti har 12 vinnarar sleppa á eitt 3 tímar brandskeið. |
| Kl. 10-23 | Snarskivan | Øssur Mohr hevur listaframsýning |
| Kl. 20-23 | Teledepilin | Tónleikur alt kvøldið við m.o Unn Patursson |
| Kl. 16 | Torgið í SMS | Angela og Hannibal undirhalda |
| Kl. 17 | | TrøllaPætur, Omman og Erling politistur undirhalda |
| Kl. 19 | | Sangkórið Suð við orkestri framførir kendar sangir hjá m.ø. Abba. |
| Kl. 20 | | Nósabarnaprix-vinnarin í 2004, Ingibjørg Hansen syngur. Afturat sær hevur hon Kim Hansen og James Olsen. |
| Kl. 21 | | Sangkórið Suð við orkestri framførir kendar sangir hjá m.ø. Abba. |
| Kl. 23 | | Bólkurin 200 spælir |
| Kl. 19 og 21 | Skansapakkhúsið | Rundvísing |
| Kl. 20.00 | Vesturkirkjan | GHM hevur konsert |
| Kl 17-23 | Onkunstaðni í býnum | GHM bás og eitt festligt program |